## Læs minningarorð um seg sjálvan

Apple-stórin, Steve Jobs (myndin), upplivdi í gjár nakað, sum er teimum fægstu unt. Hann kundi lesa minningarorð um seg sjálvan! Tað var tíðindastovan Bloomberg, sum av vanvart kom at kunngerða minningarorðini, eftir at søgur vóru farnar at ganga um, at Steve Jobs aftur hevði fingið krabbamein í brisið. Hann fekk staðfest krabbamein í brisið í 2003, men er lektur. Tað var ein tekniskur feilur sum gjørdi, at Bloomberg almannakunngjørdi minningarorðini, sum tó beinanvegin vórðu tikin aftur.



## Ódnin Gustav herjar

Tað kostaði eftir øllum at døma ikki mannalív, tá ódnin Gustav í nátt herjaði á Jamaica. Gøturnar í høvuðsstaðnum Kingston vóru menniskjatómar, tá glopraregn og ódnarvindar leikaðu í. Ódnin hevur higartil kostað 68 mannalív í Karibien. Takið reyk av fleiri húsum, trø koppaðu og á fleiri vegum var ikki koyrandi, tí áir skolaðu tvørtur um teir. Veðurfrøðingar siga, at Gustav nú byggir seg upp til komandi nátt, tá ódnin rakar Cayman Islands.

# Fólkið avgerð lagnuna hjá Hvanna



*Í Hvannasunds kommunu eru í dag 436 fólk. Um ein mánað ella so skulu tey til fólkaatkvøðu, um kommunan skal leggja saman við Klaksvík. Meiningarnar eru ymiskar, og tí dugir eingin at siga, hvat úrslitið verður*

**»Sjálv, ella saman í eina stóra kommunu!« Innanfyri tær næstu tríggjar vikurnar skulu teir 436 borgararnir í Hvannasunds kommunu eftir ætlan avgera lagnuna hjá kommununi: Skulu tey verða fyri seg sjálvan ella leggja saman við Klaksvík. Henda greinin er ein roynd at lýsa tær ymisku meiningarnar hjá fólkinum í Hvannasundi, Norðdepli, Depli, Norðtoftum og í Múla**

REPORTASJA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Hvannasund:** - Tað er ikki lætt hjá okkum at taka støðu, tá okkara egnu fólkavaldu bygdaráðslimir ikki eingang eru samdir, um vit skulu leggja saman ella ikki!

Hesa seinastu tíðina hava umboð fyri kommunurnar í Hvannasundi og Klaksvík arbeitt við einum leisti, sum skal enda við at báðar kommunurnar verða lagdar saman í eina.

Hóast arbeiðið er komið væl áleiðis, dugir eingin at siga hvat úrslitið av fólkaatkvøðuni verður. Henda spurningin hava vit sett fokus á við at vitja ymisk støði í kommununi, fyri at hoyra viðmerkingar hjá fólki til spurningin.

Trupulleikin í øllum málinum, og tann rættiliga sjáldsama støðan í Hvannasundi er, at borgarstjórin í kommununi, Júst Poulsen ikki hevur verið við í hesum samráðingum, tí hann er beinleiðis ímóti eini samanlegging við Klaksvík.

Sosialurin hevur fleiri ferðir vent sær til hansara fyri at fáa viðmerking til málið, men hann hevur altíð borið seg undan. Ístaðin hevur næstformaðurin í bygdaráðnum, Pól Fuglø staðið á odda fyri samráðingunum við umboðini fyri Klaksvík.

Hetta hevur undrað bygdafólkið almikið, tí sum eitt teirra sigur: - Tað er ótrúligt, at teir ikki kunnu setast saman og finna eina loysn, sum báðir kunnu liva við. Tað er í øllum førum tað minsta, sum ein kann krevja av tveimum fólkavaldum bygdaráðslimum.

- Hetta fer bara at gera okkara støðu veikari. Men eg vænti kortini, at næstformaðurin fer at fáa eitt gott úrslit, sum vit øll kunnu verða fegin um og fáa gagn av.

Í komandi mánaði fæst at vita, um Norðoya kommuna eisini fer at umfata tær fimm bygdirnar í Hvannasunds kommunu.

### Tilgongdin

Fyrrapartin mikudagin var Pól Fuglø á fundi við umboð fyri Klaksvíkar kommunu, har teir løgdu seinastu hond á ein kunningarfaldara.

Hesin kunningarfaldarin skal sendast í hvørt húski í kommununi ein av fyrstu døgunum í komandi viku. Her verður greitt frá øllum tí, sum hevur við ætlaðu samanleggingina at gera.

Ein partur av faldaranum er at vísa á tilgongdina í hesum málinum, og her verður eisini dagur settur á, hvussu málið við samanleggingini skal fremjast tann komandi mánaðin:

Fyrst verður faldarin sendur út. Síðani verður borgarafundur hildin, har fólk fáa møguleika at seta fram spurningar.

Beint eftir hetta verður so sjálv fólkaatkvøða hildin í øllum bygdum í Hvannasunds kommunu. Fyrst tá fæst at vita, um bygdafólkið heldur tað sama sum meirilutin í bygdaráðnum.

- Eg veit, at nógv fólk eru ímóti samanleggingini. Men eg ivist onga løtu í, at tá tey hava lisið faldarin og eru kunnað um ætlanina, so fara tey helst at broyta hugsan, sigur Pól Fuglø.

### Hvørva í mongdini

Júst hetta, hvat fólkið sigur til ætlaðu samanleggingina, er tann stóri og avgerandi spurningurin. Enn dugir nevniliga eingin at siga, hvat úrslitið av eini slíkari kann gerast.

Eingin ivi er um, at hugsanin um hetta málið er sera ymisk millum bygdafólkið. Um tað er fifty-fifty, ella kanska 70:30 fæst ikki at vita, fyrrenn talt er upp eftir fólkaatkvøðuna í næsta mánaði.

Tá ein tosar við bygdarfólkið er eisini skilligt, at tey eru sera misjøvn á máli. Spurningurin um allar tær mongu milliónirnar, sum kommunan eigur á bók, er eitt av teimum eymu evnunum.

Felags fyri tey sum eru ímóti, er júst óttin fyri, at Klaksvík skal fara avstað við øllum hesum pengunum, og tja, - kanska bara brúkar tær aðrastaðni enn í Hvannasundi – til dømis at asfaltera í Klaksvík, gerð av eldra-